# Troyttir menn fóru í koyggjuna

**Tú sást bátarnar og hoyrdi menn tosa í WHF’inum á ferðini til Hetlands, men tú visti ikki, hvør var innanborða. Tað var soleiðis ein hugnalig løta, tá ið hesir troyttu siglarar umsíðir kundu heilsa hvørjum øðrum og kundu skifta orð um, hvussu gingist hevði á ferðini um hav**



HETLANDSFERÐ (2)
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fyrru frásøgnini um bátaferðina í Hetlandi greiddu vit frá sjálvari ferðini úr Føroyum og teimum umleið 170 fjórðingunum um hav.

Eftir at hava siglt í einar 29 tímar tilsamans, løgdu vit seks bátarnir, sum vóru í fylgi, til bryggju í bygdini, Symbister á oynni, Whalsay. Oyggin liggur norðanvert Lerwick og miðskeiðis í Hetlandi, um landið verður roknað suður og norður.

Nakrir bátar høvdu lagt til bryggju undan okkum, og nakrir komu seinni.

Ætlanin við at steðga í Whalsay, var, at bátarnir, sum vóru á veg til Hetlands í ymiskum fylgjum – summir fyrri og summir eitt sindur seinni - kundu savnast á einum staði, áðrenn teir allir stevndu inn til Lerwick í einum stórum fylgi.

Haraftrat høvdu fyrireikararnir hug til at geva teimum troyttu siglarunum eina hvíld og møguleikan at uppliva eina vakra hetlendska bygd.

### Troyttir siglarar

Flestu menn, kvinnur og børn, sum við vóru, mundu eisini vera troytt, tá ið flaggskrýddu bátarnir umsíðir lógu bundnir, hvør uttan á øðrum í góðu og tryggu havnini.

Eingin av manningini umborð á glastrevjabátinum Ethel, sum undirritaði var við, steig yvirhøvur í land hetta kvøldið, áðrenn farið varð í koyggjuna.

Gingið varð ímillum nærmastu bátarnar, samstundis sum prátað varð um ferðina niður. Teir 29 tímarnar var tú komin at kenna bátarnar, og tú hevði hoyrt menn tosa í WHF’inum, men tú visti ikki, hvør var innanborða. Tí var tað áhugavert nú at síggja, hvørji hesi fólk í veruleikanum vóru.

Á ferðini niður fylgdust vit eitt nú við einum snotuligum Viksund-glastrevjabáti, og tað var ikki í mínum tonkum, at Kjartan Mørkøre og sonurin, Jógvan Mørkøre saman við einum triðja bátsfelaga, vóru umborð á hesum báti.

Meðan bátarnir enn damlaðu á Havnarvág og bíðaðu eftir at stevna út á hav, sást tú eisini, at onkur smágenta var umborð á onkrum báti. Í tvassuta veðrinum, sum var um náttina, hugsaði tú um, hvussu tey mundu hava tað, nú hesi smáu før veltust higar og hagar undan aldunum.

Tað var soleiðis ein hugnalig løta, tá ið hesir troyttu siglarar kundu heilsa hvørjum øðrum og skifta orð um ferðina.

Onkur bátur hevði á leiðini til Hetlands mist streymin, so elektrisku tólini ikki virkaðu, og í fylginum hjá okkum høvdu tveir bátar av seks verið í hesi støðu. Tað kom tí væl við, at fleiri av monnunum dugdu at fáast við motorar og el, tí í flestu førum var talan kortini ikki um tey stóru brekini, tá ið saman um kom.

Hjá okkum var eitt rele farið, meðan vit enn vóru einar 40-50 fjórðingar úr landi. Hesum tók Frits, sum eigur bátin Hera í Kollafirði, sær hegnisliga av.

### Góður dagur

Tað var stuttligt at vakna morgunin eftir. Sólin skein bæði oman og niðan og fólk, sum vóru komin oman á bryggjuna at forvitnast, lótu okkum vita, at hesin dagurin mundi vera ein tann besti, tey høvdu havt á sumrinum.

Jú, sanniliga ein góður dagur.

Sum morgunin leið, og siglarar byrjaðu at koma upp úr koyggjunum og upp á bryggjuna at spáka, gingu fólk túrar niðan eftir bryggjuni og niðan í bygdina. Góður handil var beint omanfyri bryggjuna, har vit kundu keypa okkum tær vørur, okkum tørvaði.

Vit skiltu, at ætlanin var at liggja í Symbister til á middegi dagin eftir, soleiðis at vit tilsamans komu at liggja tvær nætur í bygdini.

Onkur smágrenjaði og hevði hug at spyrja, hví vit ikki stevndu til Lerwick longu dagin eftir, men dagarnir í gamla hetlendska høvuðsstaðnum gjørdust nóg nógvir kortini, tá ið saman um kom.

Her kundu vit hvíla, sóla okkum, práta við fólk og forvitnast um, hvussu ein gerandisdagur sær út í eini lítlari hetlendskari bygd.

Whalsay hevur gott ferjusamband til meginoynna, Mainland, við ferjuni, Lingu, sum ivaleyst eitur eftir oynni, West Linga, sum liggur beint innanfyri. Soleiðis eitur sundið, sum er millum hesar báðar oyggjarnar, Linga-sundið.




*Ein hugnalig bygd. Her peikar ein pílur oman í Saltness, men tað er so ikki Saltnes í Nes kommunu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Eitt stuttligt navn, kanska…

### Fasilitetirnir

Í Symbister er bátafelag – ella bátaklubbur, Whalsay Boating Club, og tí vónaðu vit, at felagið kanska hevði brúsur at bjóða okkum, meðan vit lógu. Tað høvdu teir ikki. So, reingerðin av okkum sjálvum fór fram uppi í svimjihøllini, sum er á staðnum. Ein løta var at spáka niðan, men tað var eingin trupulleiki. Vit høvdu jú gott av at strekkja okkum beinini…

Vit fingu heldur ongan landstreym, sum kemur ógvuliga væl við hjá siglarum til hita, kabússur, rakimaskinur, løðing av akkumulatorum, fartelefonum og teldum – um tað skal vera.

Á eini slíkari ferð lagar tú teg til tær umstøður, sum eru, og tað ræður um at síggja tað positiva – og at vera positivur.

Vit fingu tó vatn og olju á bryggjuni, og fleiri bátar nýttu høvið at bunkra, meðan vit steðgaðu.

Vit fingu 162 litrar av olju niður í tangan, sum hevði verið oljunýtslan á ferðini niður.

Hevði Whalsay Boating Club ongar brúsur og ongan landstreym at bjóða okkum , so høvdu teir í staðin whiskey!

Ein lítil barr var í húsinum, og seinna kvøldið samlaðust fleiri av siglarunum í bátafelagshúsinum til prát um tað, sum hevði verið á ferðini - og um vónirnar um tað, sum lá fyri framman.

Við bryggju í Whalsay lá ein minni skeljabátur, sum fór og kom aftur nakrar ferðir við eini minni nøgd at skeljum. Ein einsamallur maður var við hesum báti og sum skiltist á monnum, sum høvdu skift orð við hann, gongur hendan vinnan einki serligt.

Vit sóu eisini eina gamla ferju, sum onkur siglari segði er bygd á Tórshavnar Skipasmiðju í sínari tíð.

At enda sóu vit eisini eitt ógvuliga snotuligt og vælvaksið pelagiskt fiskifar, og seinni havi eg skilt, at orsøkin til, at húsini í Symbister eru so stór og snotulig, er, at her búgva eisini nótamenn, sum gjøgnum árini hava tjent væl av peningi.

Í positivum týdningi.. kanska ein onnur Gøtubygd, har teir, sum tjena væl, hava ráð til eini betri hús.